Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Aksel V. Johannesen, løgtingsmaður

Svarari: Helgi Abrahamsen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Privatar gjaldskipanir í náttúruni

Spurningar:

1. Heldur landsstýrismaðurin tað vera í samsvari við landsins lóg, at eitt gjaldportur er sett upp í Saksun?
2. Um landsstýrismaðurin ikki heldur hetta vera í samsvari við landsins lóg, hvat ætlar hann so at gera við tað?
3. Heldur landsstýrismaðurin nakran vanda vera fyri, at um portrið í Saksun sleppur at verða standandi, fer henda skipan at vinna hevd, so almenni myndugleikin missir møguleikan fyri at seta krøv um, at tað verður tikið burtur?
4. Heldur landsstýrismaðurin nakran vanda vera fyri, at um portrið í Saksun sleppur at verða standandi, fer henda skipan at vinna hevd, so aðrir bøndur fara at hava fullan rætt til at seta í verk somu skipan, sum nú er galdandi í Saksun?

Viðmerkingar:
Í 2019 setti ein festari í Saksun upp eitt gjaldportur til ferðandi, sum vilja út á Lógv at vitja. Økið á Lógv má sigast at vera ein av Føroya mest kendu náttúruperlum, sum bæði føroyingar og ferðafólk njóta gott av.

Gongd í haga hevur leingi verið eitt nógv umrøtt evni, men enn er eingin politisk niðurstøða gjørd um rættindi og skyldur hjá festarum og ferðandi. Portrið í Saksun kann tí enda sum eitt fordømi fyri eina skipan, har bøndur fáa fullan rætt at taka pengar frá ferðandi, og harvið missir almenni mynduleikin møguleikan at skipa økið.

Á Løgtingi, 19. mai 2021

Aksel V. Johannesen